# Ítróttarfelag Fuglafjarðar



# ÍF - VB

LANDSKAPPING

Mánadagin 9. juni 2003

Kl. 14.00 í Fuglafirði

HAVSBRÚN

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

# ÍF - VB

**4. umfar í landskappingini hjá 2. deild monnum**
**9. juni 2003**

## Leikskrá 3

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Gunnvá Dam*
*Birgar Larsen*
*Janus Petersen*
*Steinbjørn í Lambanum*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Høgni Z skýtur móti málinum, uttan tó, at bólturin fór inn. Myndin er frá heimadystinum ímóti B68 17. mei í ár, og sum vit vunnu 3-1*
*Mynd: Rógvi Róin*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*

TAÐ HALDA VIT

### VENJARIN OG LEIKARARNIR

## EINA YNSKIBYRJAN

Vit hava fingið eina dreymabyrjan – ikki fleiri meiningar um tað. Og tað er langt síðan seinast, eisini at tað hevur verið so sannførandi, sjálvt um sigrarnir ikki hava verið so stórir. Okkurt árið hava vit ligið í botninum og rótast fyrstu 5-6 umførini, men soleiðis verður ikki í ár; halda vit.

-Tey 9 stigini, sum vit hava fingið í trimum teimum fyrstu dystunum eru, og verða, góð barlast, tað sum eftir er av kapping- arárinum. Og tey kunnu enntá fara at gerast avgerðandi í síðsta enda. – Mótstøðuliðini hava gott nokk ikki verið tey torfør-astu, men serliga B36 og B71 hava vit havt trupulleik-ar við undandarnu árini. Serliga dystirnir ímóti B36 í Gundadali hava verið keði-ligir fyri hagtølini hjá okkum. Tí er ábendingin higaril í ár greið: vit hava eitt gott lið og ein góðan venjara, sum fær tað rætt fram í leikarunum. Hann dugir eisini væl at seta liðið eftir liðunum, vit leika ímóti. –Og so dugir hann eisini at umstilla liðið og spæliskip-anina í sjálvum dystinum, um tað gerst neyðugt. Og tað er ein styrki, sum hann helst fær brúk fyri fleiri ferðir í ár. Og tað kann koma at verða avgerðandi.

Leikararnir hava eisini víst stóran stríðsvilja – bæði til venjing og ikki minst í dysti, eisini tá ið tað stendur á. Tað er langt síðani seinast, at tað hevur verið galdandi fyri ÍF-liðið. Helst er tað kappingin um plássini, sum er orsøkin. Menn vilja verða við á besta liðnum, og helst á vøllinum hvørja-ferð. Og at leikarar sum Rúni og Høgni á Lakjuni fyri tað mesta hava leikt við næstbesta liðnum, hóast teir venja nógv, sigur ikki so lítið um liðið.

Økta kappingin um plássini hevur eisini við sær, at vit eiga – og hava - eitt 2. lið, sum klárar seg væl í kappingini. Bárður Morten-sen er venjari hjá liðnum. Hann hevur gjørt eitt fyrimyndarligt arbeiði og hann hevur sama luksus-trupulleika, sum Sigfríður hevur, nevnliga, at kapp-ingin er hørð um um pláss-ini. –At hava eitt gott 2. lið er ein fyrtreyt fyri, at besta liðið klárar seg. Tú skal hava leikarar at seta til, og tað hava vit.

Vit vilja at enda mæla øllum til, at sláa kalt vatn í blóðið, og ikki halda, at vit longu nú eru tryggir upp-flytarar. Tað eru bert trý um-før leikt, og fimtan harðir dystir eru framvegis eftir. Tann fyrsti er longu í dag, tá ið VB vitjar.

Góðan dyst.



DYSTURIN Í DAG

### EITT VÆLMANNAÐ

## VB-LIÐ VITJAR OKKUM ÍDAG

Jú, ikki kann sigast annað enn, at vit higartil hava fingið fulla úrtøku burturúr teimum trimum dystunum, vit hava leikt. Í dag eru tað so vágbingar, sum vit skulu dystast við. Teir hava fýra stig, og liggja á einum 6. plássið. Í fyrstas umfarinum taptu teir 0-1 á heimavølli ímóti Sumba. Í øðrum umfarið vunnu teir 0-2 á B68 á Svangaskarði og síðsta vikuskiftið fingu teir ein tepran 1-1 javnleik ímóti B36 á Eiðinum. Í hesum dystinum fræftist, at B36 var betra liðið, og vágbingar høvdu eydnuna við sær.

Liðið hjá vágbingum er samansett av fleiri eldri og royndum leikarum, sum allir hava leikt við 1. deild hjá VB. Nevnast kunnu Jón Pauli Olsen, Tórur Holm, Eyðun Kjærbo, Magni Jacobsen, Elian Hansen, og Janus Kjærbo. Hesir hava allir leikt 1. deildarfótbólt í mong ár, so teir hava royndirnar, sjálvt um venjingarstøðan helst hevur verið betri enn hon er í dag.

Okkara menn, hinvegin, eru allir væl fyri til dystin í dag. Einasti leikarin, sum er ivasamur til dystin, er Ken. Hann hevur drigist við eina lítla fipurspreinging í lær-inum, og hevur tí ikki vant við fullari ferð hesa vikuna. Tí hevur venjarin sama luksus-trupulleika í dag, sum undanfarnu umførini, nevnliga, at tað eru ov nógvir góðir leikarar til tey 14 plássini, sum skulu mannast til dystin. Verður Ken klárur, verður liðið tað sama sum síðsta vikuskiftið, tá ið vit vunnu 2-0 ímóti B71. Hetta er eisini tað liðið, sum venjarin, beint nú, heldur verða tað besta, og av tí sama eisini tað mest samanspælda. Um Ken ikki verður við í dag, byrjar Heini nokk í vinstru síðu. Tað eru aðrir møguleikar eisini, eitt nú kann Høgni Z. loysa Ken av í vinstra borði, meðan Roy kann spæla á miðvøllinum fyri Høgna Z. Høgni á Lakjuni kemur nokk í hópin fyri Ken. So hesaferð leika Martin, Rúni og Rógvi - sum spælir sín fyrsta dyst síðan steypa-dystin ímóti AB í mars mánaða – við 3. deild ímóti B36. Tann dysturin verður beint eftir 2. deild-a-rdystin.

Vónirnar hjá okkum í dag eiga at vera góðar. – Umframt at nærum allir eru tøkir, hava leikararnir sjálvsálit, og hetta er ógvuliga týdningarmikið, um vit framvegis skulu halda stimin. Men vit mugu kortini ikki undrimeta royndu leikararnar hjá VB, og halda at dysturin er vunnin frammanundan. Nei, teir fara at leggja alt fyri at fáa stig ídag. Tað er eingin ivi, at serliga verður lagt nógv fyri í verjupartinum, fyri síðani møguliga at revsa okkum. Tí mugu vit ikki ótolnast, um einki mál kemur. Dysturin er 90 minuttir ella meira, tað sóu vit í Havnini.




*Høgni Z er ein av teimum leikarunum, sum vit seta stórt álit á. Hann hevur eisini leikt væl, og í dystinum í Havn ímóti B36 var hann stóri leikarin. Hann tryggjaði okkum eisini sigurin í yvirtíðini.*

# FYRIREIKINGARNAR Í GONGD

## Spennandi kapping, har tú m.a. kanst vinna ein spildurnýggjan Ford Focus. Samlaða virði av vinningum er kr. 300.000,00



Fyrireikingarnar til Varmakeldustevnuna, sum verður vikuskiftið 4.-6. juli, eru í fullsving. Umframt aðalnevndina og undirnevndirnar eru útisetin, Torfinn, og blaðstjórin og hjálparvenjarin, Rógvi, við í fyrireikingarnevndini. Tey lata væl at skránni, sum er rættuliga fjølbroytt, bæði hvat viðvíkur mentanarligum og meira løttum tiltøkum.

Leisturin, sum fyrireikingarnevndin hevur nýtt, er tann sami sum síðsta ár, tá ið stevnan var góð og væl móttikin av bygdafólkinum og annars stevnugestum sum heild. Og hví ikki endurtaka eina "succes".

Onkur forkunnug tiltøk verður tó, sum ikki vóru á skránni í fjør. Komandi mikudag byrjar ein serstakliga spennandi kapping, sum ongantíð er roynd her heima áður. Kappingin loysir av góðu gomlu lutaseðlarnar og í fjør lyklarnar, sum vórðu seldir við stórari undirtøku. Tó so, Hildigarð og Helena munnu óivað fara at selja lutaseðlar á stevnuni.

Nevndin strembar høgt við kappingini, tí vinningarnar hava eitt samlað virði á kr. 300.000,00. Høvuðsvinningurin er ein spildurnýggjur Ford Focus 1.6i Trend við 5 hurðum frá Ford. Bilurin hevur eitt virði á 207.500,- 2. vinningurin er ein ferð frá Maersk fyri tvey vaksin og tvey børn til Lissabon við uppihaldi á hotelli í 14 dagar. Hesin vinningurin hevur eitt virði á 50.000,00. Umframt teir báðar høvuðsvinningarnar verður drigið um tríggjar smærri vinningar hvørja viku. Vit kunnu avdúka so mikið, at øll við eini fartelefon og GSM-haldið frá Føroya Tele kunnu luttaka. Kappingin verður lýst fyrstu ferð mikudagin komandi.

Nevndin arbeiðir eisini við at stápla eitt størri og meira innbjóðandi tivolitiltak enn vanligt upp á beinini. Serliga er talan um størri og meira spennandi tiltøk fyri børn. Eitt nú er ætlanin at hava nógv fleiri hoppiborgir enn vanligt. Hetta eru alt hoppiborgir, sum ikki hava verið í Føroyum áður. Men hetta krevur alt pláss, og tí verður helst alt økið frá Haraldsen og heilt heim til Føroya Banka nýtt til endamálið. Arbeitt verður eisini við einum heilt serligum tiltakið til smærru børnini; nakað sum er væl umtókt í frítíðarparkum í útlandinum.

At enda er eisini ætlanin at seta upp ein pall á tivoliøkinum, har undirhald av ymiskum slagi fer fram. Hetta fyri at skapa eina heildar uppliving hjá teimum vitjandi á stevnuni.

-Vit vóna, at veðurgudarnir verða við okkum vikuskiftið 4.-6. juli, tí tað sær út til at verða ein fyritreyt. Eisini vóna vit, at at bygdafólki fer at verða eins hjálpsom sum undanfarin ár, soleiðis at vit fáa eina væleydnaða stevnu.



## TÚ



**Navn:** Jákup Helgi Egholm
**Føðingardagur:** 16.01.1976
**Føðistað:** Tórshavn
**Starv:** Bilmekaninkari, men eri júst byrjaður í starvi á mjøldeildini á Havsbrún
**Pláss á vøllinum:** málmaður
**Hædd og vekt:** 186 cm. og 83 kg.
**Yvirtrúgv:** havi onga
**3 orð sum lýsa teg:** avslappaður, róligur og avslappaður
**Torførast mótstøðumaður:** daman :)
**Frítíðarítriv:** telduspøl og ítrótt
**Vónir fyri 2003:** at vit flyta upp í 1. deild

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** í 1994 sum málmaður
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** uml. 8 ára gamal
**Aðrar ítróttargreinar:** flogbóltur
**Minnigarríkasti dystur:** tað minnist eg ikki
**Størstu fótbólstliga ávirkan:** hevur ikki hent enn
**Besti fótbóltsleikari:** Zidane
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** íshockey
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** skjótivenjing
**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** renning
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** ÍF - 1979

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** allur føroyskur matur, saltstegur og te
**Slag av tónleiki:** boybands, he, he; NEI! Ymiskt - frá country til rock
**Sjónvarpssending:** bottom
**At slappa av:** ja!!
**Troyggja nr.:** Nr. 22
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Zidane
**Sjónvarp/filmstjørna:** Adam Sandler
**Besta bók/blað:** Lord of the Rings




O·N·L·Y
VERO MODA

>> vælkomin í KATO
Fuglafjørður





Álvaskot
Fysioterapiviðgerðarstova

530 Fuglafjørður
Telefon 44 51 44

Álvur Hansen, fysioterapeutur
Turið L. Petersen, fysioterapeutur



**Lastvognskoyring**






**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**

**530 Fuglafjørður**
**tel. 444 245 ella 217 245**



**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| Streymoy | 34 74 00 |
| Norðoyar | 45 77 11 |
| Eysturoy | 44 87 11 |
| Vágar | 33 27 11 |
| Sandoy | 36 17 11 |
| Suðuroy N | 37 27 11 |
| Suðuroy S | 37 47 11 |








**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
**SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING**





**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- Dension hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (ídnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**Á goymslu:**

**Hydr. slangur og fittings, hydr. rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúlu-leigir, hydr. filtur, smyrji- og brenniolju-filtur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.**

**KJ-HYDRAULIK**

**P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður**
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com



Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490




Altíð til
dystin fús
FØROYA BANKI




HOTEL
Bílegging av pizza
www.pizza.fo
P.O. Box 97
FO-110 Tórshavn
Tel +298 350 000
Fax +298 350 001
hotel@hotel.fo
www.hotel.fo




Ferðaseðlar www.fonnflog.fo
kring allan knøttin
FONN FLOG
FO-700 Klaksvík · Tel. 456363 · Fax 457373 · fonnflog@fonnflog.fo






www.kondi.dk
FAXE KONDI
MED DRUESUKKER




***VØRÐSLAN***
WEARHOUSE
Í Støð • 530 Fuglafjørður • Tel. 444 747




# SV - TRANSPORT

**Allur flutningur við:**

Lastbilum | Kranabilum | Trailarum

Dumparum | Bingjubilum

**530 Fuglafjørður** **tel. 44 41 77**





**Tilfar til umvælingar, åbøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

**Fuglafjarðar Timburhandil**
**tel. 444 126**






Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, høsnarungar, svín og neyt.

Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**

Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 · fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo



## Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:
- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jørmund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo





CLIMACOOL
RESPW
800⁰⁰



REKORD
700⁰⁰



A CUB.TWIN
STRI
1.400⁰⁰



SUPERSTAR II
700⁰⁰

P/F THOMAS DAM
ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel 44 73 99 - fax 44 73 97





# Fuglafjørður



býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak



býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**



býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

Fuglafjarðar kommuna
tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo

## Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895



- Gardintoy
- Gardinstengur
- Persiennur
- Rullugardinur
- Liftgardinur
- Tógv & stokkar
- Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

**Profa Farvur**

v/Petur Gaardlykke · 600 Saltangará · tel. 44 91 49



# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)





HEWLETT® PACKARD
Expanding Possibilities

**Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....**

**Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.**

**Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.**

Vit selja og veita undirvísing í bókhaldsskipanini Stellar Office og Stellar Office Pro

## Atlantic Online Sp/f

Í Støð 8
FO-530 Fuglafjørður
Tlf: +298 444487
e-post: atlantic@online.fo

**Alfa Seafood Sp/f**

Box 10 • FO-530 Fuglafjørður • Tel. +298 44 49 51
Fax +298 44 48 48 • E-mail: alfa@post.olivant.fo

FAROE

SEAFOOD

Fiskavirkið í Fuglafirði · Postboks 53 · tel. 444 500 · faks 444 580



BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

P/F Petur Larsen




Föroya Bjór
PILSNAR


Reiðari innan frakt- & sandbátar
Krana- og lastvognskoyring
Sandsøla
SANDGREVSTUR
Stovnað 1949
530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921


Hegn
15 ára royndir við tí grøna hegninum!
TEL 31 14 00
Landsins størsti veitari
Seyðahegn • Gásahegn • Hosnanet
Maskinfløtningur • Urtagarðshegn
P/F THOMAS DAM
Á HÁLSI • HEYKAVEGUR 1


B S
P/F BOÐASTEINUR
Bakkavegur 26
FO-530 Fuglafjørður
Faroe Islands
Tlf. +298 444800
Fax +298 444840
E-mail: alibo@post.olivant.fo




Vit hava útgerðina til trol-, nóta- og alivinnuna
VÓNIN
www.vonin.com


HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
HEILDARLOYSNIR TIL ALIVINNUNA
UNDIRVATNSLJÓS
UNDIRVATNSKAMERA
TRÁÐLEYST VIDEO SAMSKIFTI
ALARMSKIPANIR
PLC-STÝRINGAR
EL-MOTORAR
EL-LUTIR
FREKVENS UMFORMARAR
EL-TALVUR
FYLGISVEINASJÓNVARP TIL SKIP
JT electric
JT electric Ltd. Kambsdalur Faroe Islands Tel +298 474444 Fax +298 474445 jtelectric.com

## *Blómuhandilin*

# *Orkis*

***625 Glyvrar***

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***

**Danny Transport**

**Tel. 31 91 92**

**Flutningur um allan heim!**

**Landsins størsta og besta úrval av ítróttarheiðursgávum**

**Steyp**
**Heiðursmerki**
**Heiðursbrøv**
**Toy við búmerki**
**Streamers**
**Klistrimerki**
**Seruppgávur við gravering**

**Vit seta títt búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað**

FA. **EILIF ARGE**
**KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK**
**TLF. 45 51 64 • FAX 45 75 76**



## Tannlæknastovan

Steintór Larsen tannlækni

Brynhild Maria Lamhauge tannrøktari

Viðtala:
8.00-12.00 og 13.00-16.00

Torkilskrókur 8 530 Fuglafjørður tel. 444 358






**Nissan Micra**

Tann nýggi Nissan Micra er ætlaður at skapa gleði millum fólk.

Tann nýggi Nissan Micra hevur til dømis minsta vendiradius í sínum flokki. Nýggi Micra hevur eisini mest framkomnu lásiskipan hugsast kann. Og tá ið tú setir bilin frá tær, lýsir hann tær heim. Vitjið hjá Nissan við Oyggjarvegin ella vitjið heimasíðuna www.nissan.fo



Nissan Micra

P/F **Meinhardt Arge**

við Oyggjarvegin
Tórshavn
tel. 345400 • fax 345401

## Bussar til øll endamál



Serflutningur til rørslutarnaði
Bólkaferðir, bæði innan- og uttanlands
Ítróttarferðir, bæði innan- og uttanlands
Skúlabarnakoyring
Bygdaleiðir
Bussar frá 7 til 56 persónar

Spf. AP Andreas Poulsen BUSSKOYRING
✆ 22 52 20 - 44 17 20
FO-513 Syðrugøta • e-mail:pouand@post.olivant.fo

*Heimavirkis søla og framsýning*

*Piddasa handil*

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

*Gallarí Ribarhús*

*Opið er:*
*mán.-frí.: 15.00-17.30*
*leyg.: 11.00-13.00*
*Tel. 444 427*



Úrvalsbilar Spf.

- Søla av brúktum innfluttum bilum
- Alt vanligt verkstaðsarbeiði verður gjørt

ÚB • www.bilar.fo

Bakkavegur • 530 Fuglafjørður • tel. 444 943 • fax 444 638 • Fartel. 281943

GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71




BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 383

HeimaGreiðslan




Tú gert av hvar og nær. Við HeimaGreiðsluni er Sparikassin opin – har og tá tú ynskir tað.

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

TRIVNAÐUR

# NÝGGJUR VØLLUR OG NEYST

## Kommunan hevur avgjørt at skifta graslíki á vøllinum út í ár, samstundis sum íløgur verða gjørdar í nýggj kappróðrarneyst

Mánadagin aftan á Varmakeldu verður arbeiðið byrjað at taka av grasvøllin í Fuglafirði og at leggja nýtt gras á fótbóltsvøllin.

Fuglafjarðar Býráð hevur samtykt eina eykajáttan upp á 2,1 millión til hetta arbeiðið. Tað er Osvald Simonsen, sum skal leggja vøllin á. Hann hevði lægsta tilboðið upp á arbeiðið. Í løtuni er vøllurin undir framleiðslu, men skal eftir ætlan vera klárur at leggja á, tá gamli vøllurin er tikin av beint eftir Varmakeldu. Væntandi tekur arbeiðið einar 14 dagar.

Við í tilboðnum frá Osvaldi Simonsen upp á 2,1 mill. er umframt arbeiðið at leggja vøllin á eisini grasvøllurin sjálvur, tvey stór mál og fýra lítil mál. Øll málini eru á hjólum. Hetta tilboðið var uml. 700.000 kr. lægri enn næstlægsta tilboðið.

Fuglafjarðar Býráð hevur eisini sett 800.000 kr. av á fíggjarlógini til gerð av nýggjum kappróðraneystum. Neystini, sum Býráðið eigur, kunnu hýsa kappróðrabátunum hjá ÍF, men møguleiki er eisini at nýta hølini, sum kunnu gerast oman á neystunum til ymisk onnur endamál.

Neystini eru nú í gerð og skuldu eftir ætlan verða liðug til Varmakeldustevnuna fyrst í juli mánaða. Men orsakað av verk-fallinum er arbeiði seinkað, og tí heldur tíðarætlanin heldur ikki.

PILTARNIR Á FERÐ

# PILTARNIR TIL KAPPING Í AALBORG

Í døgunum 23.- 27. juli verða piltarnir hjá ÍF við í kappingini Spar Nord Cup, sum verður hildin í Nørresundby og Aalborg. Piltarnir fara avstað 21. juli og koma heimaftur 28. juli. Fleiri av piltunum hava bæði foreldur og systkin við á ferðini, so hópurin, ið fer úr Fuglafirði til Aalborg, telur uml. 35 fólk. Við á ferðini verða Hanus og Henry sum venjarar og Hildigarð sum leiðari.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at lið úr Fuglafirði eru við í hesi kapping. Fyrrárið vóru dreingirnir, sum nú eru smádreingir við í somu kapping, og í fjør var eitt gentulið við í kappingini. Sigast kann, at tey, sum vóru við hesi bæði árini, hava latið sera væl at kappingini.

Ein foreldrabólkur er settur at fáa hugskot til savnan av peningi til liðið, og longu nú hava dreingirnir verið runt bygdina og savnað inn fløskur.Ikki kann sigast annað enn, at fuglfirðingar hava stuðlað hesum tiltaki serstakliga væl.

Ætlanin er eisini, at dreingirnir skulu selja lutaseðlar til onkrar dystir, tá 2. deild spælir, so vónadi fara tit áskoðarar at taka væl ímóti teimum. Vinningarnir á lutaseðlunum hesaferð eru:

*1 kassi av sodavatni*
*1 pitsa frá Prima Vera*
*1 pitsa frá Prima Vera*

Drigið verður aftan á dystin og vinnaranummørini verða lýst á talvuni í niðaru hædd í ítróttarhúsinum.

Vinnararnir kunnu venda sær til Vónbjørt, tlf. 444026

Vit á leikskránni ynskja teimum góða eydnu við tiltakinum og í kappingini í Aalborg, sum vit væntandi frætta meira um seinni.

VENJARIN UMBER

# UMBERING TIL *HIN* ÁSKOÐARIN

Meðan dystir eru verður ofta sagt, at leikararnir kunnu gerast rættuliga heitir, og til tíðir leypa teir framav. Men tað kunnu venjararnir eisini gera. Síðsta vikuskiftið, tá vit leiktu heima ímóti B71, var tað onkur av áskoðarunum á bakkanum, sum ikki helt, at leikararnir gjørdu ein nøktandi innsats á vøllinum. Hetta fekk venjara okkara, Sigfríð, at blíva rasandi. Tí er tað eitt, sum hann ikki kann taka, so er tað júst slíkt. Tíverri gekk tað útyvir skeiva persónin á bakkanum, og tað umber venjarin. –Eg visti ikki hvør rópti eftir leikarunum, men er tað eitt, sum eg ikki taki, so er tað slíkt. Eg skeldaði tann fyrsta áskoðarin, sum fyri var, og aftaná má eg ásanna, at tað var skeivur persónur, og tað umberi eg viðkomandi fyri. Hinvegin fekk eg sagt tað sum eg meinti, tí er tað onkur av áskoðarunum, sum kann gera tað betri enn teir ellivu á vøllinum, er viðkomandi vælkomin til venjing. -Og eg meini tað, sigur Sigfríður.

Vit gleða okkum til í annaðkvøld, um nakar av áskoðarunum man koma at venja við!!!!



Sigfríður leggur afturat, at um onkur áskoðari hevur okkurt at tosa við seg um, er viðkomandi vælkomin í ítróttarhúsið eftir vanligu mánakvøldsvenjingina millum kl. 20.00-20.30. So er tað sagt.




Vit skifta rútin meðan tygum bíða
BE AUTOGLAS
Tlf. 444215
Fuglafjørður
Lamineraðir frontrútar til øll bilmerkir




FLÜGGER
• Dygdarmáling til lágan prís
• Lyklar. innramming, gólvtilfar og fiskireiðskap til smábátin
*Tasjan á Bugnum*
530 Fuglafjørður
tel. 44 50 44
fartel.: 22 11 09

AT STYTTA SÆR STUNDIR VIÐ

# TIPS 13

Í kappingini "vedda og vinn við Birgari og Janusi" vinnur besti tipparin í einstøku kappingunum ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Umframt vikuvinningin sleppa allir 9 vinnararnir út at bowla saman við 1. liðsleikarunum eftir kappingina. Vinnararnir eru eisini við í lutakastinum um ein APEX-flogferðaseðil frá Atlantic Airways.

Fyri at luttaka og vinna, skalt tú seta kross í tann rútin (1, X ella 2), ið tú heldur/veitst eru rættir. Skrivað navn, bústað og tlf.nr. og lat hann inn í ovaru hædd í ítrottarhúsinum undir ella beint eftir dystin. Tann ella tey, sum hava svara flest spurningum rætt, eru við í lutakasinum um sodavatns-kassan. Góða eydnu!

*Røttu svarini til spurningarnar hasaferð fært tú at vita í næstu leikskrá. Svarini og vinnarin frá seinast eru á bls. 31.*

ATLANTIC AIRWAYS

Navn:

Bústaður:

Telefon:

*TIPS 13 seðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum í seinasta lagi 15 min. eftir loknan dyst.*



VEDDA OG VINN VIÐ BIRGARI OG JANUSI

## ÍF TIPS 13 (set x í rætta rútin)
## 3. UMFAR

| | 1 | X | 2 |
|---|---|---|---|
| 1. Hvussu eitur málverjin hjá EB/Streymi? 1. Bjarni Johansen X. Egin Høgnesen 2. Gunnar á Steig | | | |
| 2. Hvar er Frank Skytte venjari? 1. HB X. B36 2. B68 | | | |
| 3. Nær bleiv B71 stovnað? 1. 1970 X. 1971 2. 1972 | | | |
| 4. Hvørjum liðið heldur Trúgvi við í Onglandi? 1. Liverpool X. Manchester Utd. 2. Arsenal | | | |
| 5. Hvørjum liðið hevur Jes Høgh <u>ikki</u> leikt fyri? 1. Chelsea X. Besiktas 2. Brøndby | | | |
| 6. Hvat land umboðar Emmanuel Olisadebe? 1. Nigeria X. Grikkaland 2. Pólland | | | |
| 7. Hvussu eitur heimavøllurin hjá Portsmouth? 1. Molineux Ground X. Fratton Park 2. Gay Meadow | | | |
| 8. Hvør hevur metið sum tann yngsti leikarin, ið hevur leikt í Premier League? 1. Andy Campbell X. Sol Campbell 2. Wayne Rooney | | | |
| 9. Hvat lið hevur fingið fægst stig í einum kappingarári í Premier League (1992-2003)? 1. Swindon Town X. Sunderland 2. Norwich | | | |
| 10. Hvat er fjarstøðan frá mállinjuni út til brotssparksplettin? 1. 9,15 metrar X. 11 metrar 2. 11,5 metrar | | | |
| 11. Hvar leikti Michel Salgado áðrenn hann kom til Real Madrid? 1. Deportivo La Coruña X. Racing Santander 2. Celta Vigo | | | |
| 12. Málspark: Málverjin sparkar til bóltin í hørðum mótvindi. Bólturin fer út um brotsteigin og fýkur síðani við vindinum inn í egið mál... Hvat ger dómarin? 1. Homaspark X. Mál 2. Umspark | | | |
| 13. Hvussu nógvar dystir leikti Franco Baresi fyri AC Milan? 1. 716 dystir X. 736 dystir 2. 756 dystir | | | |



Klipp eftir skrædd

# HAGTØL & FAKTA

## STØÐAN 2. DEILD MENN - 4. juni

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. ÍF | 3 | 3 | 0 | 0 | 6-1 | 9 | 2-0-0 | 1-0-0 |
| 2. Sumba | 3 | 2 | 0 | 1 | 10-3 | 6 | 1-0-0 | 1-0-1 |
| 3. TB | 3 | 2 | 0 | 1 | 8-6 | 6 | 2-0-0 | 0-0-1 |
| 4. AB | 3 | 2 | 0 | 1 | 8-4 | 6 | 2-0-0 | 0-0-1 |
| 5. KÍ | 3 | 2 | 0 | 1 | 7-11 | 6 | 2-0-0 | 0-0-1 |
| 6. VB | 3 | 1 | 1 | 1 | 3-2 | 4 | 0-1-1 | 1-0-0 |
| 7. LÍF | 3 | 1 | 0 | 1 | 4-5 | 3 | 1-0-0 | 0-0-1 |
| 8. B71 | 3 | 1 | 0 | 2 | 2-3 | 3 | 1-0-0 | 0-0-2 |
| 9. B36 | 3 | 0 | 1 | 2 | 1-4 | 1 | 0-0-1 | 0-1-1 |
| 10. B68 | 3 | 0 | 0 | 3 | 3-8 | 0 | 0-0-1 | 0-0-2 |

## LEIKARAHAGTØL 2. DEILD MENN 2003:

| Nr | Leikari | D | Min | Út | Inn | G | R | M | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fróði Poulsen | | | | | | | | |
| 2 | Áki Petersen | 3 | 270 | | | | | | 79 |
| 3 | Jan Skoradal | 3 | 270 | | | | | | 34 |
| 4 | Viggo Johannsen | 3 | 270 | | | | | | 5 |
| 5 | Heini Heinason | 3 | 101 | 1 | 2 | | | 1 | 10 |
| 6 | Fritleif í Lambanum | 2 | 55 | | 2 | | | | 21 |
| 7 | Martin Hansen | | | | | | | | |
| 8 | Sverri Ellingsgaard | 3 | 259 | 1 | | | | | 78 |
| 9 | Rúni Petersen | 1 | 11 | | 1 | | | | |
| 10 | Hanus Eliasen | 3 | 256 | 1 | | | | 2 | 117 |
| 11 | Eyðolvur R.-Petersen | 3 | 255 | 1 | | | | | 71 |
| 12 | Rógvi Róin | | | | | | | | |
| 13 | Høgni á Lakjuni | 1 | 15 | | 1 | | | | |
| 14 | Kon Bærentsen | 2 | 131 | 2 | | | | | 10 |
| 15 | Eyðun Ryggshamar | 1 | 22 | | 1 | | | | 2 |
| 16 | Jákup Helgi Egholm | 3 | 270 | | | | | -1 | 4 |
| 17 | Høgni Zachariassen | 2 | 180 | | | 1 | | 2 | 44 |
| 18 | Alli Petersen | 3 | 206 | 3 | | | | | 44 |
| 19 | Roy Róin | 2 | 39 | | 2 | | | 1 | |
| 20 | John S. Thomsen | 3 | 270 | | | | | | 78 |

*FRÁGREIÐING: D: Dystir; Min: Minuttir leiktir, Út: Dystir útskiftur; Inn: Dystir innskiftur; G: Gul kort; R: Reyð kort; M: Mál; Stig: í kappingini "ársins ÍF´ari"*

## Vert at vita

Næsti dystur hjá okkara monnum er leygardagin 14. juni, tá ið vit skulu til Klaksvíkar at leika móti KÍ. Næsti heimadystur er móti TB leygardagin 21. juni.

3. deild spælir í dag ímóti B36 heima. Næsti dystur hjá teimum er sunnudagin 15. juni móti NSÍ í Runavík.

Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so er tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 30, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini Ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.

## Aðrir dystir í dag 2. deild

B71 - LÍF

B36 - KÍ

B68 - TB

Sumba – AB

## Dystir í 1. deild 15.06 - 5. umfar

NSÍ - B68 (spældur 14.06)

SKÁLA - KÍ

HB - EB/Streymur

GÍ - VB

FS Vágar - B36

## Dystir í 3. deild 09.06 - 4. umfar

ÍF - B36

Royn - FS Vágar

GÍ - NSÍ

EB/Streymur - TB

HB - Skála

## Málskjúttar - 2. deild

| | |
|---|---|
| Eirikur Joensen, Sumba | 5 |
| Eyðun Samuelsen, AB | 4 |
| Kaj Roest, TB | 4 |
| Høgni Zachariassen, ÍF | 2 |
| Hanus Eliasen, ÍF | 2 |
| Dan Mortensen, TB | 2 |
| Jóhan Dávur , B68 | 2 |
| Heini Heinasson, ÍF | 1 |
| Petur Sjúrðaberg, LÍF | 1 |
| Bárður Heinason, LÍF | 1 |

# ÁRSINS ÍF´ARI 2003

## HANUS AFTUR DAGSINS MAÐUR HESAFERÐ



Í dystinum ímóti B71 seinasta vikuskiftið valdu áskoðararnir aftur Hanus til dagsins leikara. Hesaferð vóru fleiri atkvøður og eisini enn harðari kapping um plássini.

Fyri at vera besti leikarin fær Hanus ein døgurða-bita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku!

**Atkvøðutal**

| | ÍF-B71 | Íalt |
|---|---|---|
| Hanus Eliasen | 66 | 117 |
| Áki Petersen | 50 | 79 |
| John S. Thomsen | 45 | 78 |
| Sverri Ellingsgaard | 42 | 78 |
| Høgni Zachariassen | 37 | 44 |
| Atli Petersen | 36 | 44 |
| Eyðolvur R. Petersen | 36 | 71 |
| Jan Skoradal | 34 | 34 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letu[r] prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letu[r] sunnudagsdøgurða fyri tvey t[il] besta leikaran í hvørjum a[v] landskappingardystunum í ár.

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum alla[r] atkvøðuseðlarnar um eit[t] krov frá Haraldsen.

HARALDSEN
- títt keyp -

## Atkvøðuseðil

ÍF - VB, 9. juni 2003

Dystur: ____________

Nr. 1 (5 stig): ____________ Leikari

Nr. 2 (3 stig): ____________ Leikari

Nr. 3 (2 stig): ____________ Leikari

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari: ____________ Tel.: ____________





# SØLUBÚÐIN ER FRAMVEGIS Í OVARU HÆDDINI

Damurnar, sum síðstu árini hava havt sølubúð í ovaru hæddini í ítróttarhúsinum í sambandi við dystir hjá 1. liðnum, eru aftur í ár til dystin fús. Hildigarð stendur fyri, men hon fær góða hjálp frá øðrum. Í sølubúðini selja tey sodavatn, kaffi, te, kakur og góðgæti. Sølubúðin hevur opið frá dystarbyrjan til beint eftir dystin. Tað er eisini í sølubúðini, at tey, sum atkvøða um ársins ÍF´ara og tey sum gita í kappingini ÍF TIPS 13, skulu lata seðlarnar inn.

Sjálvt um hølisviður-skiftini ikki eru av teimum bestu, so er tað eisni í sølubúðini, at prátið um dystin, leikararnar og venjarin fer fram - bæði í hálvleikinum og eftir dystin.



## ÍF TIPS 13 - vinnarin og svarini frá síðstu kappingini

Hørt Nesá gjørdist besti tipparin seinast. Hann hevði 11 rætt av 13 møguligum, og var hann tann einasti, sum hevði so mong rætt. Hann fær ein kassa av sodavatni frá Føroya Bjór. Tillukku við tí. Hann sleppur somuleiðis út at bowla við 1. Liðshópinum seinni í heyst, og so er hann eisini við í lutakastinum um Apex-flogferðaseðilin frá Atlantic Airways.

Røttu svarini til teir 13 spurningarnar seinast eru:

| ÍF TIPS 13 - Spurningar og svar - 2. Umfar: | Tekn: | Svar: |
|---|---|---|
| 1. Hvat lið gjørdist Føroyameistari 1. Deild menn 2002? | 1 | *HB* |
| 2. Hvar er Michael Laudrup venjari? | X | *Brøndby* |
| 3. Hvør er yngsti leikari, ið hevur leikt á føroyska A-landsliðnum? | 2 | *Ingi Højsted* |
| 4. Hvønn er FS Vágar stovnað? | 1 | *1993* |
| 5. Hvør er elsti leikarin í 2. Deildar hópinum hjá ÍF? | 1 | *Ken Bærentsen* |
| 6. Hvørjum liðið í Italia, heldur liðleiðarin hjá ÍF við (fíggvi)? | 1 | *Milan* |
| 7. Hvat lið fekk flestar javnleikir í Premier League 02/03? | 1 | *Bolton* |
| 8. Hvør gjørdist topskjútti hjá Chelsea í Premier League 02/03? | x | *Gianfranco Zola* |
| 9. Hvussu eitur vøllurin, har Týskland leiktu ímóti Føroyum Oktober 2002? | 2 | *Niedersachsen* |
| 10. Hvat eru krøvini til ein bólt, ið verður nýttur í kvinnumannadeildunum (ummál)? | 2 | *68-70 cm.* |
| 11. Hvat lið er IKKI úr London? | 1 | *Bolton Wanderers* |
| 12. Eyðolvur rekur við bóltinum frammvið málverjanum hjá B68, samstundis spýtir Jákup Helgi í nakkan á Aksel Hejgaard í brotsteignum hjá ÍF... Hvat skal dómarin gera? | 2 | *Hann dømur brotsspark til B68 og gevur Jákup Helga reytt kort.* |
| 13. Landsliðsvenjarin hjá okkum, Henrik Larsen, hevur spælt 39 dystir á danska landsliðnum, men hvussu nógv mál fekk hann...? | 1 | *5 mál* |

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

***Aðalnevndin:***
Formaður
Rúni Petersen, tel. 215887
2. formaður
Høgni á Lakjuni tel. 444418
Peningarøkil:
Linda Joensen, tel. 445132
Skrivari:
Hildigarð Eliasen, tel. 444052/228771

***Fótbóltsdeild:***
Hildigarð Eliasen tel. 444052
Eivin Breiðaskarð, tel. 214003
Ólavur Larsen, tel. 224659
Mortan Nónsgjógv
Atli Petersen, 444 018

***Venjarar:***
***2. deild:***
Sigfríður Clementsen, tel. 31 76 59
***3. deild:***
Báður Mortensen, tel.
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 21 37 10
***Dreingir Ø.:***
Janus Petersen, tel. 26 43 99
***Smádreingir Ø.:***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Smádreingir 1/2 vøllur***
Ragnhard Petersen, tel. 26 02 90
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Hanus Eliasen, tel. 22 17 52
***Smápiltar:***
Atli Petersen, tel. 26 82 95
***Gentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***Smágentur:***

***G.10-12 ár:***
Jónfríð Joensen, tel. 254170
***Yngst:***
Hanna Poulsen

ÍF

VB

1. Fróði Poulsen
2. Áki Petersen
3. Jan Skoradal
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Fritleif í Lambanum
7. Martin Hansen
8. Sverri Ellingsgaard
9. Rúni Petersen
10. Hanus Eliasen
11. Eyðolvur R. Petersen (liðsk.)
12. Rógvi Róin
13. Høgni á Lakjuni
14. Ken Bærentsen
15. Eyðun Ryggshamar
16. Jákup Helgi Egholm
17. Høgni Zachariassen
18. Atli Petersen
19. Roy Róin
20. John S. Thomsen

Venjari: Sigfríður Clementsen
Hj.venjari: Rógvi Róin
Liðleiðarar: Trúgvi Nesá
Tórstein Joensen

___ Finnbogi Olsen
___ Magni Jacobsen
___ Eyðun Kjærbo
___ Niclas Ludvík
___ Eyðstein í Lágabø
___ Janus Kjærbo
___ Elian Hansen
___ Hartmann Hansen
___ Jón Gærdbo
___ Tórur Holm
___ Bergur Winther
___ Tummas Richard
___ Per Joensen
___ Heini Jacobsen
___ Jón Pauli Olsen

Venjari: Jón Pauli Olsen
Hj.venjari:
Liðleiðari: Kári Poulsen

## Dómarabólkur:

Dómari: Dia Lamhauge, NSÍ
Hjálpardómarar úr NSÍ

## Boltsponsorur:

Jørleif Petersen, málarameistari